SOSIALURIN 19
FRÍGGJADAGUR 14. FEBRUAR 2020


# Nýggja KOKS




## Hábærsligir karmar um hendinga-ríka ferð úr Havnini og vesturum

*Staðið, har nýggja KOKS skal byggjast, verður hornasteinurin undir menningini av KOKS komandi mongu árini*

EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO

– Vesturstrondin á Suðurstreymoy er ein sera væl egnað pallseting fyri eina framtíðar staðseting av KOKS. Teinurin til høvuðsstaðin er avmarkaður, samstundis kennist vakra náttúran serstakliga nærverandi, sigur Johannes Jensen.

Hann vísir á, at havsbrúgvin í vestri kennist serstakliga hjáverandi og alfevnandi á staðnum. Her síggjast smærri og størri oyggjar, sum umhvarv móti havsbrúnni í vestri. Tú gerst støðugt ovfarin av áhaldandi og skjótu broytingini av havi og á himmalhválvinum.

– Vit síggja yvir Hestfjørð, hoyra dunandi brimi frá havaldu og verða samstundis umgyrd av flógva ljósinum frá sólsetrinum í vesturhavinum, greiðir Johannes Jensen frá.

### Fjallrøðinar stórsligið baktjald hjá teim vitjandi

Í skitsjuuppskotinum til verkætlanina verður skrivað, at fjøllini og líðirnar á vesturstrondini eru brattar og hábærsligar og vera karmur um eina hendingaríka ferð úr Havnini og vesturum. Somuleiðis kunna steyrrættu fjallarøðirnar framvið vesturstrondini gerast eitt stórsligið baktjald hjá tí vitjandi á matstovuni.

Og sum Gist & Vist og Ósbjørn Jacobsen, arkitektur, skriva í skitsuprojektinum:

– Tað er lætt at ímynda sær løtumyndina, hendingaríka spennið millum at sita til borðs í briminum eina útsynningsódn á hávetri ella í sólsetri á midnátt eitt summarkvøld.

Visjónin fyri nýggja KOKS er bygd upp kring eitt ótal av yvirskipaðum málum, ætlanum og smálutum, sum tilsamans gerast ein fullfíggjað verkætlan – men allir lutir og visjónin handan verkætlanina taka støðið í tveimum høvuðstræðrum: Máltíðini og náttúruni.

Visjónin í nýggju verkætlanini er miðvíst at flætta hesar báðar træðrir saman til eitt enn sterkari sameint upplivilsi, enn tað á nakran hátt er gjørligt at røkka hvør sær.

KOKS sum vit kenna tað, tekur støði í tí føroyska. KOKS fær smakk og anga úr føroyska landslagnum og sameinir tað í matinum.

### Upplivilsið skal knýtast til náttúru og umhvørvi

Visjónin við Nýggja KOKS er at binda endarnar í ringrásini saman. Nýggja KOKS heldur áfram við tí, tey longu hava reinskað nær fullkomileika - men harafturat er visjónin, at upplivilsið skal knýtast til náttúruna og umhvørvið, soleiðis at heildarupplivingin, kann røkka hæddum, sum annars ongantíð kundu hugsast gjørligar at rokkið hvør sær.

Visjónin; samanrenning millum náttúru, rávøru, matgerð, máltíð, landslag og umhvørvið, skal upplivast sum ein fullkomin ringrás við máltíðini sum savnandi aðaltátti í heildarupplivingini.

Við atliti til samleika hjá KOKS og við ynski um at taka støðið í og finna íblástur í eini siðbundnari tilgongd til bygging og viðgerð av landslag, ynskja vit at nýtulka og granska hesi høvuðsevni við tí fyri eyga at nýta tey í eini nútímans bygging.

Náttúrulig samanrenning millum landslag og bygning. - Vit kenna tað frá siðbundnari eldri bygging í Føroyum, har byggingin evnar at javna markið millum náttúruligt landslag og manngjørda verkið, soleiðis at tað kann vera torført at fáa eyga á.

Roykstovan – Tann føroyski søguligi 'mentanar- stovnurin,' sum hevur verið karmur um søgur og virksemi, sum knýta seg til lívið, ið gjøgnum øldir er farið fram har. Hettar hevur verið íblástur til køkin, sjálvt hjartað á matstovuni.

– Vit halda, at tað er ein spennandi røð av líknandi áhugamálum millum ynskir til køkin og háttin roykstovan í gamlari tíð varð nýtt, skriva tey í skitsuuppskotinum.

Tilfar og byggiháttur – Útgangsstøðið er burðardygga tilgongdin til at gagnnýta staðbundið tilfar, í so stóran mun sum til ber. Rannsaka møguleikar í siðvenjuni, til til dømis, at nýta tað tunga saman við tí viðkvæma, tað afturlatna upp móti tí opna og tað heita mótvegis tí kalda.

Tann føroyski garðurin ella býlingurin – At taka støði í tí tøttu og skiftandi føroysku byggingini í landslagnum, fyri at royna at skapa ta best hóskandi funktiónssamansetingina og eitt vart uttandura tún, sum kann gerast ein livandi karmur um uttandura virksemi.


*Her síggjasgt bàðir KOKS býlingarnir í Fossdali við Koltur í baksýni*



*Her nærkast vit norðrara býlinginum í Fossdali. Longur suðuri hómast býlingurin við sjálvari matstovuni*

## Michelin handar stjørnur mánadagin

Mánadagin verða Michelin stjørnurnar fyri Norðurlond handaðar á einum tiltaki í Tróndheimi í Noreg.

Tá fæst millum annað at vita, um KOKS hevur megnað at varðveitt tær báðar stjørnurnar, sum matstovan fekk seinast. At fáa eina Michelinstjørnu er eitt bragd í sjálvum sær. Eingin hevði ímyndað sær, at ein føroysk matstova fór at megna at fáa eina stjørnu, men at KOKS skuldi fáa tvær, tað er líka stórt, sum at fótbóltslandslið okkara vann á heimsmeistarunum.

Við nýggju ætlanunum í Fossdali leggur KOKS lunnur undir tað, sum kann fáa KOKS heilt til tops millum heimsins bestu matstovur. Tann týdnigur, sum tað hevur fyri Føroyar og føroyska ferðavinnu, má ikki undirmetast.


*Karen Visth, víntænari á Koks, Johannes Jensen, stjóri, og Pól Andrias Ziska, høvuðskokkur á KOKS til Michelin-handan*


*Í roykstovuni er vítt til veggja og opið upp í tróðrið*

## Roykstovan er hjartað í bygninginum

Tá tú sum gestur ella starvsfólk kemur til matstovuna, so kemur tú til felags túnið, sum er kringsett av smærri húsum, sum hýsa øllum funktiónum á matstovuni. Túni liggur heldur lægri í lendinum enn vegurin til matstovuna fyri at skapa eitt fjálgt og vart uttandurarúm.

Tankin er, at túnið skal kunna nýtast til alskyns endamál, til ymisk tiltøk fyri gestir, tað kundi verið at onkur uttandura máltíð kundi verið búgvin til yvir eldstaðnum, mitt í túninum. Tað er eisini ætlanin at ymisku funktiónirnar kring túnið kunna lata framsíðurnar upp og flyta virksemi út í tún, ella bjóða tí vitjandi inn. Tað kundi t.d. verið, at eitt lamb ella ein kálvur verður flettur í hagreiðingarrúminum, ella at fólk úr grovkøkinum eru úti í tún og hagreiða dagsins skurð av grønmeti – tað er bert hugflogi sum setur mørkini.

### Roykstovan er hjartað

Roykstovan er hjartað í bygninginum, her er vítt til veggja og opið upp í tróðrið. Her er borðreiðingarkøkurin, somuleiðis er ytra rondin í roykstovuni gjøgnumgangsrúm hjá øllum gestum, so gesturin ávegis til sítt pláss, upplivir huglagið og virksemi í roykstovuni. Allar meginfunktiónir eru beinleiðis samanbygdar við roykstovuna, soleiðis at roykstovan fær siðbundna dámin av virksemi og at at vera savnandi rúmið, sum knýtir aðrar funktiónir á garðinum saman.

Miðskeiðis í roykstovuni er arbeiðsøki, har starvsfólk húsast, og í vestara enda er eldstaðurin.

### Vanliga Matstovan

Í útnyrðingshorninum á roykstovuni er vanliga matstovan. Matstovan er skipað í tvær lonir við opnum tróðri. Bakveggurin móti eystri er tungur laðaður veggur við hugnaligum innvikum, sum eru polstraði við heitum tilfari av leðri og skinni. Framsíðan vestureftir er opin við framúr góðum útsýni fyri allar gestir til oyggjarnar og havsbrúnna í vestri. Samansetingin av lonunum og laðaða bakvegginum skapa góðar krókar til ymiskar borðuppstillingar, har gestir ikki kenna seg sita mitt úti á gólvinum.

### Privata Matstovan

Í útsynningshorninum á roykstovuni er privata matstovan. Hon er bygd upp á sama hátt sum vanliga matstovan, tó er privata lonin sett við skjøldri móti sjónum, soleiðis at allir gestir við stóra borðið, hava gott útsýni vestur í hav. Frá privatu matstovuni er atgongd hjá gestum, til eitt bakøki við privatari gardrobu, toilettum, vínkjallara, lounge og uttandura útsýnispalli í Fossdalsgjógv.